

Viðskiftafólki okkara ynskja vit eini gleðilig jól og eitt av Harranum signa nýggjár.

Vit hava stongt frá mikudegnum 22. des. kl. 12.
Opið verður aftur 3. januar kl. 8.

***Vatnsoyra Snikkaravirki pf.***
***&***
***Føroya Gluggi pf.***



# Norðoyaredaktiónin í jólafrí

Redaktiónin hjá Sosialinum í Klaksvík er stongd frá og við hósdegnum 23. desember til mánadagin 3. januar.

Í hesum tíðarskeiðinum verða viðskiftafólk vinarliga biðin um at venda sær til høvuðsdeildina á Argjum á tlf. 341800 ella á teldupost: post@sosialurin.fo

Gleðilig jól og gott nýggjár.

FØROYA HANDILSSKÚLI

# Projektleiðari

Føroya Handilskúli er ein vinnuskúli, sum veitir merkantilar útbúgvingar, herundir miðnámsútbúgvingar og hægri útbúgvingar. Harafturat virkar skúlin í altjóða netverkum, sum ger tað møguligt saman við stuðulsveitarum og útlendskum hægri lærustovum at veita merkantilar hægri útbúgvingar, eitt nú sum fjarlestur. Endamálið við altjóða samstarvi er at veita førleikamenning til føroyska samfelagið og vinnuna.

**Virkisgrundarlag**
Føroya Handilsskúli skal vera við til at nøkta tørvin hjá leiðslum og starvsfólkum í vinnuni og innan tað almenna at loysa uppgávur professionelt og at taka skilagóða avgerðir.

Føroya Handilsskúli setir fokus á menning og góðsku í undirvísingini.

**Virksemisøkir**
· Hægri útbúgvingar
· Hægri Handilsskúli, HH
· Fyrisiting, Handil og Søla, FHS

Á Føroya Handilsskúla starvast lærarar, inspektørar, samskiparar, starvsfólk til umsiting og aðrir lærarar uttanhýsis frá.

**Høvuðsuppgávur hjá projektleiðaranum**
· Strategisk ráðlegging
· Stýra, býta út, raðfesta og samskipa uppgávur
· Seta saman umsóknir um stuðul til útbúgvingarprojektir
· Fíggjarlig og umsitingarlig ráðlegging og rapportering av projektunum
· Samstarv og samskifti við altjóða hægri lærustovnar, vinnuna og stovnar í Føroyum.

**Vit kunnu bjóða**
· Starv við spennandi og fjølbroyttum uppgávum
· Sjálvstøðugt starv.

Tú fær møguleika at víðarimenna virksemi innan hægri útbúgvingar.

**Vit leggja dent á, at tú**
· Hevur hægri útbúgving
· Førleika og royndir innan projektleiðslu
· Dugir væl at skriva og tosa enskt
· Dugir væl at samskifta við starvsfólk og lesandi
· Hevur góðan tænastuhugburð
· Dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Møguligar leiðslu og/ella undirvísingarroyndir eru ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt starv, sum verður lønt og skipað eftir nærri avtalu. Starvið er tíðar- og uppgávuavmarkað. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera skrivstovuni hjá Føroya Handilsskúla í Havn í hendi seinast 17. januar 2005, kl. 16:00.

**Upplýsingar**
Meira fæst at vita við at venda sær til Reidar Nónfjall, stjóra á Føroya Handilsskúla á tel 317177 ella 217177.

*Føroya Handilsskúli er ein stovnur í støðugari menning. Skúlin er sjálvsognarstovnur, ið er skipaður í tríggjar høvuðsdeildir, sum er deildin í Tórshavn og á Kambsdali, sum fyrst og fremst hava miðnámsútbúgvingar, FHS og HH, og Menningardeildin, sum rekur menningarvirksemi, td. samstarv við fróðskaparsetur uttanlands. Skúlin hevur eisini deildir í Klaksvík, Vágum og Suðuroy.*

*Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á fyrisiting, handil og skrivstova (FHS).*

*Í Havn starvast um 35 og Kambsdali 20 lærarar. Samanlagt starvast um 80 fólk á skúlanum.*

*Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðinga-útbúgving, Master of Management, HD, datanom og merkonom. Føroya Handilsskúli og tekniski skúli í Tórshavn samstarva um Skeiðsdepilin.*

*Fleiri upplýsingar um virksemi á Føroya Handilskúla kunnu fáast á heimasíðuni:* **www.fh.fo**

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · Tel 317177 · Telefax 313374
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður · Tel 444900 · Telefax 444901
**Heimasíða skúlans: www.fh.fo**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3880**
Navn: Sp/f Status

**Hjánavn:** Sp/f Bókhald (Sp/f Status)
**Adressa:** Skáltavegur 21, Box 250, 700 Klaksvík

**Kommuna:** Klaksvíkar Kommuna
Stovningardato: 13.12.2004
**Viðtøkudato:** 13.12.2004
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Líggjas í Bø, Skáltavegur 21, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Líggjas í Bø, Skáltavegur 21, 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 13.12.2004 - 31.12.2005
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka bókhaldsvirksemi og annað virksemi, sum er tengt at hesum vinnum.

Skráseting Føroya tann 20. desember 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 774,** P/F Status, 700 Klaksvík.

**Viðtøkur broyttar:** 16.12.2004.
**Nýtt navn:** P/F 16.12.2004.
**Strikan av hjánavni:** P/F Bókhald
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Beinta í Bø, 700 Klaksvík (formaður), Rógvi Líggjasarson í Bø, 700 Klaksvík og Unn í Bø, Husumgade 1, 5.5, DK-2200 København N.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Líggjas í Bø, Skáltavegur 21, 700 Klaksvík

Felagið er tann 16.12.2004, farið í likvidatión við Niels Winther Poulsen, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Box 52, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 20. desember. 2004.

Kristin Balle

